# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum mongu,
sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu
og veittu okkum umsorgan og hjálp,
nú kæra kona mín og mamma okkara

**Mia Kjærbæk**
f. 30.04.1969 - d. 26.09.2005
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum hava verið um okkum
og hava veitt okkum so nógva hjálp,
meðan Mia hevur verið sjúk.
Hjartans tøkk til Bjarna Bæk og Jógvan Fríðrikson
fyri góð og fløvandi orð.
Tøkk til kirkjutænararnar fyri framúr hjálp og hita,
tøkk til sangarar, tøkk til kirkjukórið
og til Unn, Rógva og Herluf fyri sangin,
tøkk til vinfólk fyri stuðul og hjálp,
tøkk til 2. og 5. flokk fyri hjálp til ervið.
Tøkk fyri blómur og kransar, uppringingar og brøv,
gávur til genturnar og Føroya Felag móti Krabbameini.
Tøkk til tykkum mongu, sum komu at siga Miu farvæl.

**Hjartvard, Bára, Herborg og Svanna**
**Foreldur, systkin og verfamilja**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá fastir okkara

**Ebba Arge**
Argir

doyði og varð jarðað.

Takk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Takk til prestar, sangarar og berarar.
Takk til Lágargarð fyri tíðina Ebba búði har.
Takk fyri hjálpsemi til ervið.
Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Edvin og Elly**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri samkenslu og stóra hjálp, tá ið
elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Hjalmar Gregersen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, sum komu inn á gólvið og
tykkum, sum á ein hvønn hátt hjálptu til
við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Akurin.
Hjartans tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað her.

**Ruth, Katrin, Martin, Heini, Sólrun og Ingrid**

# Havgrímur Hammer á Tvøroyri
## til minningar

**f. 21.09.1935 - d. 05.11.2005**



Hesin sálmurin bleiv sungin í kapellinum tá ið Havgrímur bleiv borin út í Kirkjuna.

*Mær er sagt um ein stað í tí høga*
*har ei sjógvarnir bróta um strendur*
*har ein vandar og pínslur meg møta*
*um eitt bil ja so eri eg har*
*eg má undrandi lovsangin syngja*
*tá eg hugsi um himmalska heimi*
*um enn mangt man meg møða og tyngja*
*tó eitt bil ja so eri eg har*

*Í tí landi ei tár skulu renna*
*eingin pína og sjúka skal níva*
*har ein særandi sorg er at kenna*
*um eitt bil ja so eri eg har*
*ei skal gleðinnar dagur har halla*
*ei skal ivin tá tyngja mítt sinni*
*aldri meira vit snáva og falla*
*tí tá eru vit heima o Guð*

*Har hvørt Guðsbarn skal standa so fegið*
*skrýtt í snjóhvítum búna á himni*
*mær er sagt um ta ævigu gleði*
*og eg hugsi O var eg bert har*
*tá tann fremsti lovsyngjandi skari*
*leikar gullhørpum á við Guðs trónu*
*hoyrist syngjandi samfelda svarið*
*tú vár kongur vár harri og Guð*

Sálmurin lýsir hansara føstu Guðstrúgv.

Best sum sólin fagrast skínur deyðin inn um dyrnar trínur. Soleiðis verður sagt í vakra sálminum, sum lýsur ferð okkara úr vøggu í grøv.

Hetta rann mær í huga, tá eg fekk deyðsboðini av vina og samstarvsfelaga mínum Havgrími Hammer á Tvøroyri.

Væl visti eg at hann í nógv ár hevur verið sjúkur, men tó komu deyðsboðini dátt við - tað koma tey nú altíð. Havi kent Havgrím í nógv ár, og vit hava samstarvað í Tvøroyrar býráð, har hann gjørdi eitt megnararbeiði. Havgrímur var ein av teimum sum gingu á odda, tá ið Tvøroyrar Flakavirki bleiv veruleiki, og var eisini oddamaður tá ið vinnulívið skuldi byggjast upp frá botni av. Eingin løtt uppgáva, men hon bleiv framd og fyri Havgrím fall tað lætt. Hann var sjálvur runt bygdirnar við tekningarlista, og væl bar til, tí hann var ein bjartskygdur maður. Ein maður sum tordi at taka avgerðir og standa við tær.

Havgrímur var skúlalærari, og sum slíkur var hann í læru hjá Martin Holm sála, tí kom hann at leggja støðið til nýggju ítróttar greinina flogbóltur, og okkurt hevur fest røtur. Ikki bara hevur Havgrímur ført hesa grein til tað støðið, hon er á her hjá okkum, men helst hevur hetta skundað undir at vit hava eina íttróttarhøll, tí formaður fyri byggingini var Havgrímur Hammer.

Sum ungur var hann ein av okkara fremstu fimleikarum her á landi. Politiskt var ongantíð nakað sum tók hann av slóðini, og tað takki eg fyri.

Eg fari at minnast vin mín við takksemi og eg drýpi høvur í tøgn og virðing.

Tit sum vóru hansara og stóðu honum nær, tit vóru hansara eitt og alt, og øll minni bera uppi í sorgarstund.

**Ein vinur**

# Zakaris Heinesen í Snarskivuni

**FRAMSÝNING**

Hósdagin 24. november læt listamaðurin Zakaris Heinesen upp eina listaframsýning í Snarskivuni á Vaglinum í Havn.

Framsýningin við vatnlitsmyndum er ein søluframsýning, og myndevnini eru landslagsmyndir úr øllum Føroyum. Framsýningin er opin fram til jólar.

Umframt hesa framsýningina hevur Zakaris Heinesen allan desember mánað eina framsýning við oljumálningum í Leikalund í Klaksvík.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, og listamaðurin Zakaris Heinsen í Snarskivuni*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*